# FYLGISKJAL 1 – MANNAGONGD OG KRAV UM VASKING

Reingerðin skal í minsta lagi samsvara við vanligt støði fyri stovnsreingerð (miðal ella standard kvalitetsstøði). Sí fylgiskjalið, fyri nærri lýsing av uppgávuni.

Útbjóðari veitir útgerð, sápu o.s.fr.

Um tilboðsgevi hevur tøkniligar loysnir, so sum vaski robottar, er útbjóðari áhugaður í at hoyra nærri.

## 1. DAGLIG REINGERÐ

- Starvsfólkaves
    - Vaskast væl hvønn dag
- Starvsfólkainngongd
- Gongd millum lonur
    - Turrmoppa og vaska eftir tørvi
- Gólv í stovunum og køkunum
    - Dustsúgving ella vasking eftir tørvi
- Stórkøkur
    - Vaska gólvið. Almannaverkið tekur sær av restini
- Hurðahandtøk
    - Handtøk skulu reingerðast hvønn dag
- Áfylling av pappír, sápu o.l.
- Tøming av ruskspannum
- Vesi hjá búfólki
    - Skal í útgangsstøði vaskast einaferð um vikuna gjølla. Tað er tó tørvur á, at eftirhyggja vesini dagliga og at vaska har tað er tørvur á tí, t.d. vesikumma, vask og gólv.

## 2. VIKULIG REINGERÐ

- Búfólkainngongdir
    - Støvisukast
- Turka eftir yvirflatum í stovum og køkum eftir tørvi
    - So sum kontórborð, skenkir, tv- møblir
    - So sum taka eftir plettum á hurðum og veggum
    - So sum at taka eftir vindeyga, um tað eru plettar
- Kømur og ves hjá búfólki
    - Í summum førum verður tørvur at vaska vesi oftari, eins og lýst undir dagligari reingerð
- Fundarhølið
    - Vaskast væl einaferð um vikuna
- Leiðarakontór
    - Vaskast væl einaferð um vikuna
- Starvsfólkarúmini
    - Vaskast væl einaferð um vikuna
- Sansarúm
    - Vaskast væl einaferð um vikuna
- Fótlistar vera støvaðir av

## 3. MÁNAÐARLIG/REGLULIG UPPGÁVA

- Yvirlitið yvir reingerðingsútgerð o.s.fr. har økir har amboðini eru
- Lappar og moppur verða vaskaðar av útbjóðara og lagdar uppá pláss
- Vaska karmar og hurðar eftir tørvi

## 4. MANNAGONGD

### VESI HJÁ BORGARUM OG HJÁ STARVSFÓLKI

Vaska vask, spegl og dispensarar. Vaska gólvini – væl inn í øll horn og aftan fyri hurða. Kanna hurð og hondtøk og tak teir plettar í eru.

Vaska kummuna væl innan og uttan.

*Eftir tørvi: Vaska veggir framvið kummuni*

Vesi hjá borgarum skal vaskast einaferð um vikuni, og vesi hjá starvsfólkið hvønn dag.

### INNGONGD (STARVSFÓLKAINNGONGD OG AÐRAR INNGONGDIR)

Starvsfólkainngongdin skal vaskast hvønn dag.

Inngongd hjá borgarum, hevur teppi. Teppi skal støvisukast einaferð um vikuna.

### GONGD MILLUM LONIR

Turrmoppa gongina hvønn dag og støvisuka einaferð um vikuna. Neyðugt er at koma framat hornum og aftanfyri hurðum.

*Eftir tørvi: Gongdin verður nógv brúkt, og kann tí serliga tá veðrið er vátt, gerast skitin skjótt.*

### FELAGSØKIR (FELAGSKØKAR, STOVA O.A.)

Gólvið í køkunum krevur ofta meira reingerð, enn stovunum. Tað skal í útgangsstøði vaskast dagliga.

Gólvið í stovunum skal vaskast dagliga.

Yvirflatur (borð og annað) í køkinum takast eftir einaferð um vikuna.

*Eftir tørvi: Tak eftir fingramerkjum á øllum glasflatum, skápshurðum. Tak eftir gólvið í køkinum, sum kann hava tørv á meira reingerð – so sum eyka dustsúgving og vasking.*

### STÓRKØKUR

Her skal bert gólvið vaskast. Starvsfólk taka sær av restini.

### HURÐAR OG HURÐAHANDTØK

*Eftir tørvi: Vaskast regluliga.*

## STARVSFÓLKARÚM OG LEIÐARAKONTÓR

Vaskast einaferð um vikuna. Tað skal takast eftir yvirflatum. Starvsfólkini taka sær av restini.